

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 05 - 2013

# Grøn orka 10.000 arbeiðspláss hjá grannunum

Varandi orkukeldur sum vind-, aldu- og sjóvarfallsorka kunnu skapa meira enn 10.000 nýggj arbeiðspláss í oyggjasamfeløgunum út fyri Skotland stendur í eini frágreiðing, sum stjórnin hevur tikið stig til skrivar Scotsman.com Slík menning í Hetlandi, Orknoyggjunum og Hebridunum kann vera við til at seta Skotland á heimskortið, sum leiðandi innan havtøkni. Men útreiðslurnar av og trupulleikarnir at kunna binda í elnetið merkir, at stjórnin má viga útreiðslur og fyrimunir av at menna varandi orku upp ímóti øðrum elorkukeldum stendur í frágreiðingini. Stjórnin í London hevur sett sær fyri at røkka einum máli, har 1% av samlaða orkutørvinum í Bretlandi í 2020 skal koma frá varandi orkukeldum, ið krevur, at 30% av elorkuni í landinum skal koma frá varandi orkukeldum. Skotska stjórnin ætlar, at meginparturin av elorkunýtsluni skal koma frá varandi orkukeldum í 2020. The Department of Energy and Climate Change, DECC og skotskir ráðharrar hava heitt á orkuráðgevararnar Baringa Partners og TNEI um at koma við einum tilmæli um, antin skotsku oyggjarnar við hjálp av varandi orkukeldum klára at liva upp til hetta málið og hvat er neyðugt at gera fyri at røkka málinum. Ráðgevararnir siga, at tørvur er á at samskipa politikkin á økinum sum skjótast, skal hetta eydnast. Okkara niðurstøða er, at til ber ikki at menna varandi orkuna á skotsku oyggjunum við verandi politikki. Kostnaðurin av at byggja upp eitt nýtt undirstøðukervi við eitt nú at binda í elnetið er ov høgur, og tað fer at gera tað fíggjarliga torført hjá teimum, sum skulu standa fyri menningini.